# Nøvn

## Føðingar

2. oktober fingu Anja Olsen og Elvin M. Olsen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3700 gr.

5. oktober fingu Frida og Jóhan Klakstein, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur.

10. oktober fingu Brynhild Næs Petersen og Bárður Toftum Petersen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3575 gr.

10. oktober fingu Ann Mari Ljósstein og Finnur Joen-Jacobsen ein son. Hann vigaði 3450 gr og var 51 cm langur.

11. oktober fingu Jenny og Richard Áarskarð, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3800 gr.

12. oktober fingu Dina Splidt og Ragnar Dam, Leynum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4230 gr.

12. oktober fingu Birita Højgaard og Niels Kristian Lisberg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3860 gr.

14. oktober fingu Eyðfríð og Jóhan Hendrik Vík, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3600 gr.

14. oktober fingu Jastrid McGavin Haldansen og Háldan Haldansen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4820 gr.

14. oktober fingu Óluva Dahl Olsen og Hans Arne Davidsen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4230 gr.

15. oktober fingu Kristina í Króki Eliasen og Karl Jakob Ósá Eliasen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4550 gr.

15. oktober fingu Durita Poulsen og Jákup Svart-hamar, Skælingur, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4650 gr.

15. oktober fingu Beinta Tórolvsdóttir og Torkil Justinussen, Leirvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3240 gr.

15. oktober fingu Durita Nielsen og Arni Petersen, Syðrugøtu, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3625 gr.

15. oktober fingu Durita og Rúni Nolsøe, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

16. oktober fingu Jessy Atladóttir og Andrias Højgaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4375 gr.

16. oktober fingu Sonja og Nicolaj Falck, Nólsoy/Reykjavík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4390 gr.

17. oktober fingu Jóna og Kristian á Rætt, Oyrabakka, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3750 gr.

19. oktober fekk Helena Rubeksen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 47 cm long og vigaði 2175 gr.

# Tórður Holm 1938-2010



Góði Tórður

Nú, ið tú fert stetlandi tín seinasta túr oman av Heygnum mikla, eftir Heygsvegnum til tann garð í námind, har øll sleppa at vera í friði, renna tankar og minnir fram í mínum huga. Vit komu at kennast sum heilt ungir dreingir. Men uppá ein máta var tað ígjøgnum okkara beiggjar. Tú kom í skúlanum at hava Vøgg bróðir sum síðukammerat, og gjøgnum tykkara vinarlag komu bróðir tín, Rógvi, og eg at blíva bestu vinir. Haraftrat gjørdust systur tín Marsanna og systur mín Ivy vinkonur, so tað kan sigast, at vit uppá mangar mátar høvdu nógv og gott samband tá.

Tit búðu tá inni í Bøgøtu, har sum Dia Bø hevði biograf, og har sluppu vit bara oftani inn, tá pláss var. Serliga eingilska komikaran George Formby grinu vit at og hermdu eftir. Tarzan, spældur av Johnny Weissmüller, gjørdist ein fyrimynd hjá dreingjum. Hann, sum kundi vísa fimi uppi í trøunum í urskógini og sum svimjari í áunum, har hann vann á krokodillum og øðrum villdýrum.

Seinni fluttu tit niðan á Heyggin mikla. Vit búðu úti í Hornabø, og nógv spor eru gingin oman og niðan eftir gøtuni millum hesar nýbyggjara-býlingar í Havn.

Eitt kvøldið í kjallaranum uppá á Heygnum mikla, sótu vit dreingir og skuldu gera ella smíða smábátar. Tú fann eitt bretti, um 2x5 tummar, og skuldi saga tað spískt til stevni á báti. Snøgt varð tað gjørt, tí best sum tað var liðugt, kom pápi tín oman í kjallaran og tók hetta bretti upp í hondina og skoðaði verkið. Allir vinklar vóru beinir, sagibenið var javnt og snøgt, og pápi tín segði: "Hetta er so snøgt gjørt, at tað sigur mær, at tú eigur at fara í snikkaralæru." Soleiðis bleiv tað, tú kom í læru á snikkaravirkinum í Hornabø, sum tá var nýtt og stórt. Sveinastykkið var av finasta kvaliteti, ein úthurð úr teak við sprossum og smáum rútum í erva, sum fekk sítt heiðursupláss heima á Heygnum mikla.

At gera roysnir og íðka ítrótt var allatíð heilt frammarlaga í tínum huga. Fáur man sum tú hava verið millum teir bestu í so nógvum ítróttagreinum. Tað var í fótbólti, sum tann sterki og altíð álítandi og kempandi bakkurin í B 36, sum vann føroyameistaraskapin í 1962. Tað var á 1. liði hjá Neistanum í hondbólti. Tað var á 10-mannafarinum Havnarbátinum. Tað var í svimjing og ikki minst allatíð millum teir bestu og sterkastu í Havnar Fimleikafelag.

Ein tann vakrasta myndin, sum eg minnist haðani, er har tú standandi tekur Olaf Magnussen, sum eisini var av bestu gymnastum, upp í hondstøðu í strektar armar. Tað boðar frá óvanligari kraft, venjing og koncentratión. Mær er sagt, at eingin í felagnum hevur gjørt hetta bragd síðani.

Men tíðir broytast, og ikki alt legnaðist, sum ætlanin var. Tann harða ítróttin sleit tíni bein og knø og annað við, gongdin gjørdist tung. Men eg vil minnast tín vinskap, títt lætta og káta sinni, soleiðis sum tað kemur mær fyri, tá grasið var grønt og himmalin reinur og bláur, og næstan allar leiðir vóru gongdar.

**Rolf Guttesen**

## Tórður Holm

Tórur, vinmaðurin!
Einaferð vart tú ímyndin av øllum ti,
ið hevði við ítrótt at gera.
Einaferð vart tú ímyndin av øllum,
ið spældu fótbólt.
Eingin nevndi B36 og ikki Tór Holm
Einaferð vart tú so frægur,
at fáir vóru tínir javnlíkar.
men Nornurnar spunnu tær
knortlutan trá-
tú orkaði ikki-
og lá eftir á.
Hav ein góðan blund,
nú stríðið er at enda komið.

**Levi**

# Minningarorð um
# Tommu Knudsen

At Tomma ikki er ímillum okkum longur er so óskiljandi. Okkara bindiklubbur verður ongantíð tann sami uttan teg, góða Tomma. Tú vart eitt so gevandi menniskja. Tú spreiddi ljós, har tú vart, altíð so skemtingarsom. Vit hava so ótrúliga góðar løtur at minnast aftur á saman við tær.

Tað var altíð nakað serligt at koma til Vestmanna. Vit høvdu til fragd at telja kertuljósini, ið tú hevði tendrað í tínum so hugnaliga heimi. Tú var so kreativ og dugdi so væl at fáa tað hugnaligt. Listarligur gávur hevði tú eisini, og sást hetta aftur, har tíni egnu listarverk prýddu veggirnar.

Tú fekk herviliga sjúku at stríðast við fyri 4 árum síðani. Tú hevur kempað sum fáur fyri at basa sjúkuni. Tað var ilt hjá okkum at skilja, at tú vart so sjúk. Tú var so vøkur til tað seinasta.

Tú hevði so nógv at liva fyri. Serliga nær stóðu tær tíni børn og ikki minst ommubørnini.

Tankar okkara leita til tykkum, sum hava mist so ómetaliga nógv. Lat hetta vera tykkara troyst, at hon er komin til ein betri stað.



Má Harrin styrkja tykkum í sorgini.

Við hesum fáu orðum vilja vit lýsa frið yvir minnið um Tommu.

**Bindiklubburin**